


*- Tjóðveldi toldi ikki, at vit høvdu ein ráðharra, sum hevði veruligar politiskar visjónir. Orsøkin er sera einføld. Tey eru konfliktskaparar og ikki konfliktloysarar, sigur Hanus Kamban*

*Hyggja vit at monnum sum Høgna Hoydal og at hansara fylgi, so hava hesi fólk ikki livað upp til hesa somu skyldu. Við at minka blokkin uttan at skapa fyritreytir fyri at fylla í aftur gloppini, hava hesir menn eina høvuðsábyrgd av, at okkara land í dag, í svárari krepputíð, er í uppisetri við likviditet.*

dirvi og hugflog. Men hinvegin – ikki fá av fólkunum á Tjóðveldisins vinstravongi megna ikki at gera eitt heiðurligt arbeiði, tíansheldur at lyfta ein ráðharrasess. Hesi fólk eru – sum vit hava sæð ferð eftir ferð – konfliktskaparar, ikki konfliktloysarar. Nøkur hava, treyðugt so, eitt ávíst undirhaldsvirði sum framleiðarar av gekkaspæli fyri tann vulgera smakkin – men eru annars, tá tey skulu standa royndina, hvøss sum handabakið.

Stuttligt er at líkna saman Hans Paula Strøm og Høgna Hoydal. Báðir eru gávuríkir og hava politiskt hugflog, men bara tann fyrri virkar á veruleikans hermóti. Hugflogið hjá tí seinna – føroyskt fullveldi – vísir seg sum tíðin gongur at minna meira og meira um okkurt forkunnugt slag av virtual reality, sum – nú tað veðrast burtur "sum sápubløðra" - tekur við sær sjálvt rationalið undir blokkminkanini. Og fyri slíkan fiktivan spuna skulu tey veiku, sjúku og neyðstøddu í Føroyum revsast.

Áhugaverdast, um ein hugsar um hesa sak, er leikluturin hjá Javnaðarflokkinum. Hans Pauli var ráðharri frá 2004, og hann arbeiddi dúgliga, men – burtursæð frá onkrum stuttum lesarabrævi – minnist eg einki um, at flokkurin, tinglimir ella onnur í hansara baklandi nakrantíð komu honum til hjálpar. Tvørturímóti noyddist hann, umframt at fylla sín ráðharrasess, ferð eftir ferð í bløðini at greiða frá sínum politikki og lýsa ætlanir og einstøk mál. Er tað ikki nógv fyri?

Nakað er í einum politiskum samfelag, sum eitur veljararøkt. Tað er umráðandi, at veljarin veit, at tann flokkur, hann styðjar, er til, hevur hugsjónir, ætlanir, politisk og hugmyndafrøðilig mið. Hvat ein annars kann siga um Tjóðveldið – hetta, at røkja veljaran, duga teir. Men nú er tað so, at vit eru nøkur, sum ikki velja Tjóðveldið. Og vit noyðast at spyrja: Hevur Javnaðarflokkurin eina starvsnevnd? Ein skrivara? Ein formann? Hevur flokkurin umboð á tingi? Hevur flokkurin eina stevnuskrá? Um so er, er tað væl og virðiliga krógvað fyri okkum.

Men sjálvsagt – hugtakið veljararøkt kann ivaleyst definerast ymiskt, og kanska hevur Javnaðarflokkurin sína serligu skilmarking. Undirritaði fylti fyri stuttum 67. Eg haldi meg hava tænt mínum landi eftir førimuni, og Javnaðarflokkinum haldi eg meg eisini hava tænt, uttan at eg havi hug at fara í staklutir við tí. Heilsan er tíbetur hampulig, so eg gleddi meg til at fáa gagn av míni lítlu – lutvís skattliga óskerdu – pensjón. Men júst í hesi løtu kemur mín formaður, andbráður og fregin og neyvan tyngdur av armóð, og kunnger, at hann ætlar at taka hetta lítla íkastið frá mær. Er hetta ikki dømi um glæsiliga veljararøkt!

Frá mínum ungdómi minnist eg, at frá januar 1959 sást eitt nýtt andlit í Havnar gøtum, ein maður í svørtum klædningi og við stavi, kvikgongdur, málamikil, heilsandi til allar síður, glógvandi, sprækin av áræði, orku og hugflogi. Maðurin, sum eg seinni fekk høvi til at hitta, æt Petur Mohr Dam, og tað var hann, sum var høvuðskraftin, tá ið okkara føroyska vælferðarsamfelag bleiv útbygt og nútíðargjørt. Hann andaðist, virkin og arbeiðsfúsur til tað síðsta, tann 8. november 1968, og hevði tá aftan fyri seg tað mætasta politiska lívsverkið í okkara landi í 20. øld.

Onkuntíð hevur tað hugbitið meg, at hesin maður – sum Tróndur í Gøtu á sinni – fór at ressast og vitja aftur og – vónandi - koma norð um fjørð at knokkroyta teir menn, sum í dag í stóran mun manna hansara flokk, sum hava sett sær sum mið at syndra hansara verk, og sum enntá eru so frekir, at teir vága sær at taka hansara lýsandi navn í sín munn.

Men eg kvíði fyri, at hann kemur ikki norð at spøkja. Tí – hvør skal kunna blása lív í eitt lík?